Gøtu Kommuna

# Lærarastarv í Gøtu skúla

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara til tíðaravmarkað starv frá 26. mars til 30. juni.

Talan er um fult tímatal. Lærugreinarnar eru: før., kri. og hei. í 1. fl., evn. í 1. og 4. fl., sø. í 4. og 6. fl., ítr. í 1., 2., 4., 5., og 7. fl., hond. í 7 . fl. og ser. tørv. og ser. 3 tímar.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinu í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. februar.

Nærri fæst at vita frá skúlaleiðaranum, tlf. 441059

**Gøtu Skúlastýri**
v/ Páll jacobsen
FO-513 Syðrugøtu

# Lýsing

Søkt verður eftir fólki at gera reint í Svimjihøllini við tilhoyrandi hølum í Tofta skúla, at byrja 1. mars 2005.

Reingerðin er 20 tímar um vikuna og vaskað verður hvønn gerandisdag.

Løn sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivligar umsóknir skulu sendast til Nes kommunu, 650 Toftir, í seinasta lagi 21.02.05 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Nes kommunu, tlf. 447586.

**Nes kommuna**

Hervið verður seldur

# 1 gyllin Heimi í Haga á Bjørgum

Treytirnar fyri keypi fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 470110.

Møgulig tilboð, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 18. februar, kl. 12.00.

**Vestmanna Kommuna**

**Mentamálaráðið**

# Stuðul til yrkisleiklist

Sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m., og kunngerð nr. 18 frá 19. apríl 2004 um stuðul til leiklist v.m. verður við hesum kunnað um, at møguleiki er at søkja um stuðul til yrkisleiklist.

Umsóknarblað er at finna á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo undir »Mentan« – »Oyðubløð«. Freistin at søkja er 15. mars 2005.

Viðv. treytum og møguleikum fyri stuðli verður víst til nevndu lóg og kunngerð.

Umsóknir skulu stílast:

**Mentamálaráðið**
Postmsmoga 3279
110 Tórshavn

# Bahá'i Miðstøðin

## Bønarmøti

Mánadagin 14. februar 2005 kl. 20.00
Øll eru vælkomin

Handan slør í mínari óminniligu veru
og í hinum forna ævinleika míns kjarna
kendi eg kærleika mín fyri tær;
tí skapaði eg teg, havi innprentað á teg mína mynd
og opinberað fyri tær mín fagurleika.

# Kunngerð

Kunngjørt verður, at fínteljingin av fólkatingsvalinum 8. februar 2005, verður á Hotel Hafnia, Tórshavn (á Parnassinum), týsdagin tann 15. februar 2005, frá kl. 10.00.

**V.v.**
**Olaf á Stongunum, fm.**

# Sjálvstýrisflokkurin

## bjóðar til

## ársaðalfund/lansdfund

**á Hotel Vágum leygardagin 5. mars 2005.**

**Byrjað verður kl. 9.30.**

Vælkomin

**Sjálvstýrisflokkurin**

# Skúlin við Ósánna

Søkt verður eftir

**Vaskifólki til smíðstovuna**

Arbeiðstíðin er 10 tímar um vikuna til fast ásettar tíðir á samdøgrinum.

Løn sambært fastlønaravtalu við Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til *Birgir Joensen, skúlatænara, tlf. 216704*.

Umsóknir verða at sena til:
**Skúlan við Ósánna**
**Postboks 260**
**700 klaksvík**

í seinasta lagi mánadagin 21. februar 2005.

**Klaksvíkar býráð**

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Felagnum Tórshavn verður sunnudagin 27. februar 2005 kl. 16.00 á Hotel Hafnia.

Uppskot til mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 16. februar 2005. Dagsskrá fyri ársaðalfundin verður send limum felagsins í brævi sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

# Sethús í Vestmanna til sølu

Húsini eru í tveimum hæddum og standa við Skálaveg 21. Báðar hæddirnar eru innrættaðar.

Støddin á húsinum er: 89 m² x 2 + bilhús
Grundøkið er: 569 m²
Byggiár: 1954

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 22 40 78**

# Umboðsmannaval

Samb. Grein 28 í høvuðssamtyktini verður val av umboðum til sjúkrakassan.

Veljast skulu eitt umboð fyri Sand, eitt fyri Húsavík/Dal og eitt fyri Skúvoy.

Uppskot skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi áðrenn 15. mars.

**Sandoyar Sjúkrakassi**
**210 Sandur**